Gerst sølustjóri hjá Farpack

Farpack skal hava nýggjan sølustjóra. Uppgávan hjá sølustjóranum er at standa fyri øllum innkeypi og sølu. Ein stórur partur av arbeiðnum er at vitja kundar í Føroyum, sum í høvuðsheitum er fiskivinnan, og nakað av ferðing er eisini uttanlands til útvegarar í Norðurlondum.

Sølustjórin hevur ábyrgdina av keypi og sølu og teimum fólkum, sum arbeiða við skráseting, goymslu og fakturering. Hann tekur ímóti og avgreiðir ordrar og fyrispurningar, ger flutningsavtalur og stendur fyri kundavitjanum og kundarøkt.

Tann, vit leita eftir, skal vera dynamiskur, fleksibul og arbeiðssamur. Tú ert vanur við at arbeiða sjálvstøðugt og hevur evnini at leiða. Tú ert opin, fyrikomandi og prátingarsamur, tí tú hevur við fólk at gera, bæði úteftir og inneftir. Útbúgving er ein fyrimunur, men tað er mest umráðandi, at tú hevur royndirnar og kunnleikan til keyp og sølu.

Vit bjóða eitt spennandi arbeiði, góða løn og aðrar ágóðar.

Umsóknarfreistin er 20. juni. Tú byrjar sum skjótast, helst áðrenn 1. august, men ert tú tann rætti, so bíða vit gjarna eftir tær.

Umsóknir verða at senda til:

P/F Farpack
att. Líggjas Joensen, stjóri
Postrúm 3099
FO-110 Tórshavn

P/F Farpack umsitur fyri umleið 50 milliónir krónur um árið. Felagið varð stovnað í 1994 við tí endamáli at útvega pakkitilfar og annað slíkt til fiskivinnuna. Síðan tá er vøruskráin økt, so at vinnan sum heild er okkara kundi, og vit selja eisini uttanlands.

Farpack hevur Føroya størsta úrval av pakkitilfari, pakkiútgerð og pakkiamboðum til alla vinnuna á sjógvi og landi, og vit útvega eisini reingerðarevni, íblandingarevni, trygdarútgerð, arbeiðsklæði, eyðkenniskæði, ymisk tól og ráðgeving í tilevning av pakkitilfari v.m.

FARPACK

Staravegur 5 · P.O. Box 3099 · FO-110 Tórshavn
Tel. 35 30 00 · Fax 35 30 10 · farpack@farpack.fo · www.farpack.com

Atgongumerkir til HM - undankappingardystirnar

HM-pakki

HM-pakkin inniheldur atgongumerki til allar HM-undankappingardystirnar.

Tey sum keypa HM-pakkan f§a setur § bestu pl§ssunum § langs²Ħuni, og verĦa pl§ssini tillutaĦi eftir nÞr tey eru b²lßgt. FSF sendir s²Ħan teimum sum hava b²lagt atgongumerki v§ttan, um tilluta atgongumerki og viĦ §heitan um at gjalda innan §v²sa freist, byrja verĦur at senda v§ttanir ¼t so skj·tt forsßlan av HM-pakkanum er av.

KostnaĦurin fyri HM-pakkan er: Vaksin kr. 750,00 og bßrn kr. 200,00.

Forsßla ferĦ bert fram § heimas²Ħu FSFĵs: **www.football.fo** og endar forsßlan av HM-pakkanum, tÏsdagin 15. juni 2004.

Fßroyar-Frakland

Forsßla av atgongumerkjum til dystin Fßroyar-Frakland § T·rsvßlli, mikudagin, 8. september 2004 er byrja

So skj·tt forsßlan av HM-pakkanum er av, taĦ vil siga umleiĦ 20. juni 2004, verĦur v§ttan send teimum sum hava b²lagt atgongumerki til dystin Fßroyar-Frakland, avgreitt verĦur eftir nÞr b²leggingin er gjßrd, og viĦ §heitan um at gjalda innan §v²sa freist. Ikki goldin atgongumerkir verĦa latin ßĦrum.

Forsßlan av atgongumerkjum til dystin Fßroyar-Frakland ferĦ bert fram § heimas²Ħu FSFĵs **www.football.fo** og endar forsßlan h·sdagin, 15. juli 2004 ella so skj·tt ¼tselt er.

Dystirnir ² HM-undankappingini og kostnaĦurin til hesar eru:

Fßroyar-Frakland, 08.09.2004 § T·rsvßlli		
Forsßla:	Bßrn 0- 16 §r	kr. 80,00
	Vaksin 17 §r og eldri	kr. 220,00
ViĦ inngongdina:	Bßrn 0- 16 §r	kr. 100,00
	Vaksin 17§r og eldri	kr. 270,00
Fßroyar-Sveis, 04.06.2005		
Forsßla:	Bßrn 0- 16 §r	kr. 40,00
	Vaksin 17 §r og eldri	kr. 170,00
ViĦ inngongdina:	Bßrn 0- 16 §r	kr. 60,00
	Vaksin 17§r og eldri	kr. 200,00
Fßroyar-ĉrland, 08.06.2005		
Forsßla:	Bßrn 0- 16 §r	kr. 60,00
	Vaksin 17 §r og eldri	kr. 200,00
ViĦ inngongdina:	Bßrn 0- 16 §r	kr. 80,00
	Vaksin 17§r og eldri	kr. 250,00
Fßroyar-Kypros, 17.08.2005		
Forsßla:	Bßrn 0- 16 §r	kr. 40,00
	Vaksin 17 §r og eldri	kr. 170,00
ViĦ inngongdina:	Bßrn 0- 16 §r	kr. 60,00
	Vaksin 17§r og eldri	kr. 200,00
Fßroyar-ĉsrael, 07.09.2005		
Forsßla:	Bßrn 0- 16 §r	kr. 40,00
	Vaksin 17 §r og eldri	kr. 170,00
ViĦ inngongdina:	Bßrn 0- 16 §r	kr. 60,00
	Vaksin 17§r og eldri	kr. 200,00

FÐTBÐLTSSAMBAND FÏROYA
www.football.fo

Tíðaravmarkað starv á Bókadeild Føroya Lærarafelags

Fyri eitt av starvsfólkum okkara í farloyvi verður tíðaravmarkað avloysarastarv á Bókadeild Føroya Lærarafelags lýst til setanar frá 1. august 2004 til 1. august 2005. Starvið er 30 tímar um vikuna .

Starvið fevnir í høvuðsheitum um praktiskt útgávuvirksemi, rættlestur, samskifti við forløg úti í heimi, og annað mangt.

Til starvið krevst yrkisligur førleiki, góður kunnleiki í føroyskum, norðurlendsku málunum og enskum, og kunnleiki í teld.

Løn og setanartreytir eftir sáttmála við Føroya Lærarafelag og við góðkenning Fíggjarmálaráðsins.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Bókadeildina á tlf. 317644, ella á bfl@bfl.fo

Skrivlig umsókn við avriti av viðkomandi prógvum og møguligum viðmælum skal vera Bókadeildini í hendi í seinasta lagi 23. juni 2004:

Bókadeild Føroya Lærarafelags
Pedda við Stein gøtu 9
100 Tórshavn

Bókadeild Føroya Lærarafelags
Bókadeild Føroya Lærarafelags, sum er stovnur undir Føroya Lærarafelag, varð stovnað í 1956. Forlagið gevur fyrst og fremst út barna- og ungdómsbøkur, men eisini aðrar bókmentir, einar hálvt hundrað um árið tilsamans. Umframt hevur forlagið um hendi Barnablaðið og Skúlablaðið. Á forlagnum starvast trý fólk.

WWW.SMYRIL-LINE.COM

Smyril Line søkir starvsfólk til flogdeildina

Søkt verður eftir 2 starvsfólkum til flogdeildina á Smyril Line at byrja skjótast gjørligt.

Flogdeildin er ein sjálvstøðug deild, ið veitir tænastur til viðskiftafólk, ið ynskja at flúgva. Tað snýr seg um bileggingar við flogfari (rutu og charter) og møguligar tok- og hotellbileggingar, ið knýta seg til ferðina.

Arbeiðsuppgávurnar eru:

- Avgreiðsla av viðskiftafólki við diskin og um telefonina
- Útskriving av ferðaseðlum
- Avrokning við BSP/flogfeløg o.s.fr.

Vit vænta, at tú ert kundavinarlig/ur, sjálvstøðug/ur og hevur royndir innan bileggingarskipanir til flogfør (vit nýta Amadeus-skipanina). Eisini verður dentur lagdur á, at tú hevur góð samstarvsevni.

Vit bjóða ein persónligan sáttmála við løn í mun til førleika.

Freistin at søkja er 20. juni 2004. Umsóknin kann sendast til:

Smyril Line
Postsmoga 370
FO – 110 Tórshavn
Att. Flogdeildin

Ella við t-posti til ***njk@smyril-line.fo***

Um tú hevur spurningar viðvíkjandi starvinum, kanst tú seta teg í samband við leiðaran á flogdeildini, Berghild Jacobsen, tlf. 345925 ella søluog marknaðarstjóran, Niels Kreutzmann, tlf. 345939

J. Broncks gøta 37 · Postsmoga 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · office@smyril-line.fo

Leiðari søkist

til dagrøktina í Gøtu kommunu.

Í skipanini eru 4 dagrøktarar. Arbeiðstíðin er 20 tímar um vikuna. At byrja 9. august 2004. Dagrøktararnir eru saman ein dag um vikuna í spælistovu frá kl. 7.30 til 17.15.

Umsøkjarar við námsfrøðiligari útbúgving ella royndum við arbeiði sum leiðari, hava fyrimun. Um eingin námsfrøðingur søkir verður ófaklært fólk fyribils sett í 1 ár.

Lønin er sambært sáttmála hjá Føroya Pedagogfelag. Freistin at søkja er 21.06.04.

Pedagogar søkjast

til Dagstovnin í Gøtu.

1 pedagog, fast starv, til arbeiði á barnagarðsstovu 4-6 ár, 21 pláss.
Arbeiðstíðin er 35 tímar um vikuna. At byrja 9. august 2004.

1 pedagog, avloysari fyri pedagog í farloyvi í 1 ár til arbeiði á smábarnastovu, 2-4 ár, 18 pláss.
Arbeiðstíðin er 35 tímar um vikuna. At byrja 9. august 2004.

Um eingin pedagogur søkir verður hjálparfólk sett fyribils.
Lønin er sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag. Freistin at søkja er 21.06.04.

Eru spurningar um arbeiðini, ring til Torgerð Hansen, leiðara á Dagstovninum, tlf. 442012 lokal 10 ella 218012.
Gøtu kommuna tekur sær rætt til, frítt at velja ímillum umsóknirnar ella ongan at seta.

Umsóknir skulu sendast til
Dagstovnin í Gøtu
511 Gøtugjógv

Grundstykki ella trøð á Argjum/Tórshavn

ynskist til keyps.

Vinarliga upplýs matr. nr., støðd og ynski um kostnað.

Skriva til:
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn
Bill. mrk. 08/06

Húsavørður

Fyri húsavørð í farloyvi verður søkt eftir húsavørði til kommununa – fyribils fram til 1. juli 2005.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til kommunuskrivstovuna tlf. 441012.

Umsóknir við upplýsingum, m.a. um evt. útbúgvingar og royndir, skulu verða kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 21. juni á middegi.

Kommunustýrið skilar sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknirnar ella onga at taka.

Gøtu Kommuna
Postboks 40 · FO-510 Gøta

Gøtu Kommuna

Lærarastørv í Stranda skúla

Stranda skúli søkir eftir 2 lærarum í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2004/2005.

Bæði størvini eru fulltíðarstørv. Annað starvið er fyri lærara í farloyvi, og hitt er vegna serligan tørv. Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknirnar skulu vera skúlastýrinum í hendi seinast 21. juni 2004 kl. 12.00.

Nærri upplýsingar fáast frá skúlastjóranum, telefon 447955 ella 218029.

Skúlastýrið fyri Stranda skúla
v/ Súna Kristiansen
480 Skála

Køkshjálp

Søkt verður eftir einum fólki at hjálpa til í køki okkara.

Arbeiðstíðin er mánadag til fríggjadag kl. 10-14.

Keypmaðurin »úti í Grønlandi«
Johannes Andreasen
Grønlandsvegur 16 · 100 Tórshavn
Tlf. 312087

Fylg við hvat er heitt & feitt – vitja pop.fo